# Leygardagurin er dagurin í Klaksvík

Skráin fyri Føroya Sjómannadag í Klaksvík byrjar longu í dag, tá sjómanssøgur og sjómansvísur verða í Atlantis. Í morgin eru eisini nøkur tiltøk á skránni, og tá gerst Bátasavnið í Leirvík partur av skránni. Fríggjadagin er tað serliga fiskivinnuráðstevnan, sum er á skránni. Tey nógvu tiltøkini og tann stóra skráin verður ikki fyrr enn leygardagin, sum er dagurin, tá væntandi er, at hópur av fólki fara at streyma til Klaksvíkar. Ikki minst, tí hendan dagin verður eisini ókeypis at koyra undir Leirvíksfirði. Skráin fyri leygardagin er rættiliga rúgvusmikil og áhugaverd. Tað, sum eyðkennir hendan dagin, eru tær kappingar, sum skipað verður fyri – eisini føroyameistarakappingar í eitt nú trolbøting, at vinda hespur upp í noða, í sjómanstaki, at kasta fanglínu, at halda dreggi, í kelving, at skera agn – og í egning. Hetta eru vælskipaðar og spennandi kappingar, sum hava savnað nógv fólk hini bæði árini, Føroya Sjómannadagur hevur verið hildin. Hópur av øðrum tiltøkum eru eisini á skránni leygardagin, og tað er eisini hendan dagin, at stevnan verður sett av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø. Kappingar eru eisini í togtogan millum skipsmanningar, og grindahvalir verða skornir upp á bryggjuni. Á skránni leygardagin verður eisini bjargingarroynd, og finala verður í SkipaQvistini. Leygarkvøldið verður ókeypis dansur á Stangarbrúnni – "dans på brygga", sum tað verður rópt. Fólkadansur verður sýndur, og undirvíst verður eisini í línudansi. **(-vilmund)**

# Klaksvík



*Stigtakarar saman við íslendskum fiskifrøðingi, fv.: Jákup Sólstein, Óli M. Lassen, Auðunn Konráðsson og Magnus Thor Hafsteinsson. Hetta er annað árið á rað, at skipað verður fyri hesi stevnu í sambandi við Føroya Sjómannadag*

### Neyðug tilmelding

Eini 180 fólk vóru á fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík í fjør, og serliga var talan um umboð fyri fíggingarstovnar, tryggingar, stovnar við tilknýti til fiskivinnuna og leiðandi fólk av ymiskum slagi.

Tilmelding til ráðstevnuna fer fram hjá Norðlýsinum á tlf. 456285 ella á nordpres@post.olivant.fo - og kostnaðurin fyri luttøku er 300 krónur, sum skal gjaldast á konto, 6460 1738668.

### Øll vælkomin

Óli M. Lassen, ein av fyriskiparunum, sigur, at øll við tilknýti ella áhuga fyri fiskivinnuni eru vælkomin á ráðstevnuna, men neyðugt er at boða frá luttøku, helst í seinasta lagi hóskvøldið, 16. august.

- Vit vóna, at fólk, sum fáast við fiskivinnu – á sjógvi og landi, fara at geva sær stundir at steðga á, nú alt bendir á, at høvuðsvinnan stendur yvirfyri stórum avbjóðingum, sigur Óli M. Lassen.

## FAKTA

**Fyrilestrar á fiskivinnuráðstevnuni:**

| | |
|---|---|
| Ólavur Poulsen | (bjóðar vælkomin) |
| Kjartan Hoydal | Fiskivinnupolitikkur/ fiskidagaskipanin |
| Bjarni Arnason | Støðan og lønsemi hjá fiskiflotanum |
| M. T. Hafsteinsson | Íslendska fiskivinnan |
| Meinhard Jacobsen | Fiskivinna á sjógvi og landi |



*Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, saman við konu síni. – Tað var sera áhugavert at vitja í Kjøllefjord í Noregi, sigur hann*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Føroya Sjómannadagur:

# Hátíð fyri alla tjóðina

**Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, vónar, at hesir framúr spennandi og áhugaverdu dagarnir á Føroya Sjómannadegi enn einaferð fara at gerast ein ógloymandi uppliving, bæði hjá børnum og vaksnum**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Enn einaferð sleppur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, at bjóða vælkomin til Føroya Sjómannadag í Klaksvík.

Sjálvur gleðir borgarstjórin seg til hesar dagar, sum hann rópar "hátíðardagar, sum eru halgaðir okkara høvuðsvinnu og teimum, sum har starvast".

### Vitjan í Noregi

- Fiskivinnan er berandi vinnan í okkara samfelag. Tað hevði verið svangligt hjá mongum føroyingi, um sjógvurin ikki hevði verið troyttur.

Tíðliga í summar fekk Steinbjørn høvi saman við øðrum fyrireikarum av Føroya Sjómannadegi at vitja Kjøllefjord í Noregi. Hetta var, tá norðmenn skipaðu fyri heimsmeistarakapping í egning.

- Hetta var ein sera áhugaverd vitjan, og eg kendi nógv aftur av tí, sum vit føroyingar eru so tætt knýttir at – fiskivinnuni.

Steinbjørn sigur, at í Kjøllefjord hoyrdi hann um lagnur, sum eru meinlíkar okkara.

- Kor teirra á hesum staði eru so meinlík okkara, leggur hann aftrat.

### Hug til sjógvin

Borgarstjórin vísir á, at fólk, sum eru vaksin upp í økjum, har sjógvurin setir dagsskránna, vita, hvussu týdningarmikil fiskivinnan er, og hvussu umráðandi tað er, at tað eru fólk, sum hava hug til sjógvin.

- Hóast flestu føroyingar enn í dag munnu hava hetta forstáilsi og innlit, er tó eingin ivi um, at partur av unga ættarliðnum hevur tørv á at verða kunnaður um tað lív og tær mangan skiftandi umstøður, sum sjófólk okkara starvast undir – og um tey amboð, tey arbeiða við.

### Savningarhøvi

Steinbjørn O. Jacobsen sigur, at Føroya Sjómannadagur er eitt gott høvi hjá okkara sjófólki at savnast á einum staði, bæði til gamans og álvara, har høvi verður hjá teimum at njóta samveruna við hvønn annan.

- Við hesum degi hevur Føroya fólk fingið eina hátíð fyri alla tjóðina, sum liggur á røttum staði og í viðkomandi umhvørvi her í okkara fiskivinnuhøvuðsstaði.

Borgarstjórin sigur seg vóna, at hesir framúr spennandi og áhugaverdu dagar eins og undanfarin ár gerast ein ógloymandi uppliving, bæði hjá børnum og vaksnum.

- Fyrireikararnir og tey mongu, ið taka tøk fyri hesum døgum, eiga uppiborna tøkk fyri hetta megnar tiltak, sum Føroya Sjómannadagur er, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, sum býður øllum vælkomnum til Klaksvíkar.



*Skipað verður fyri fleiri føroyameistarakappingum á Føroya Sjómannadegi. Flestu kappingarnar verða leygardagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*